**ÁRSFRÁGREIÐING HJÁ SJÚKRARØKTARETISKA RÁÐNUM 2018**

Árliga ráðstevnan fyri Sjúkrarøktaretisku Ráðini í Norðanlondum var hildin 10 og 11 septembur í Kristiansand í Noregi í sjáldsama vøkrum og hugnaligum umhvørvi. Luttakandi londini vóru Danmark, Svøríki, Grønland, Føroyar og Noreg sum vertsland. Til saman vóru 25 luttakarar, 10 úr Danmark, 2 úr Svøríki, 3 úr Grønlandi, 2 úr Føroyum og 9 úr Noregi.

Heitið á ráðstevnuni var "Fra ansigtets etikk til Facebook". Fyrilestrarnir settu fokus á hvussu risastóri sosiali ídnaðurin sum t.d. Apple, Facebook, Google og Amazon hvønn dag ávirka gerandisdagin hjá okkum og hvussu hesi kunnu ávirka bæði á ein jaligan og neiligan hátt, bæði í dagligdegnum og innan sjúkrarøktina. Nærri frágreiðing um ráðstevnuna verður í komandi Vøku. Næsta ráðstevna verður í Svøríki í 2019.

Ráðið hevur, saman við Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar, skipað fyri tveimum fyrilestrum tíðliga í 2018. Heitið á fyrilestrinum var "Varskógving" (Whistle blowing) sum eisini er ógvuliga viðkomandi fyri sjúkrarøktarfrøðingar at viðgera. Fyrilestrahaldari var Jógvan D. Hansen, undirvísari í heimspeki. Fyrilestrarnir vóru hildnir í Tórshavn, við góðari undirtøku og á Tvøroyri, har undirtøkan var heldur lítil.

Ráðstevnan, "Tað lønar seg" varð hildin 4 og 5 oktobur á Hotel Føroyum í samband við at felagið varð 30 ár. Hildur við Høgadalsá tiltakslimur í Sjúkrarøktaretiska ráðnum helt fyrilestur vegna ráðið undir heitinum "Etikkur, lønar tað seg". Hetta var áhugaverdur fyrilestur og sera viðkomandi fyri sjúkrarøktina, serliga nú etikkur rættiliga er til viðgerðar í samfelagnum.

Etiska ráðið, sum heilsumálaráðharrin hevur set á stovn, hevur heitt á Sjúkrarøktaretiska ráðið og Siðfrøðinevndina hjá felagnum Føroyskir sálarføðingar um møguleikar fyri samstarvi. Fyrsti fundir millum ráðini var í novembur, har tosað varð um samstarvsmøguleikar. Avgjørt var at byrja við regluligum fundi einaferð um árið.

Sum skrivað í viðtøkunum skal ráðið endurskoða Etisku leiðreglurnar hjá sjúkrarøktarfrøðingum við jøvnum millumbilum. Hetta arbeiðið er er í gongd og verður væntandi liðugt til aðalfundin 2020.

Arbeiðið við casum í sjúkrarøktini er ógvuliga tíðarkrevjandi, ráðið hevur tí fyribils avgjørt at arbeiða við einari case um árið og at seta hesa í Vøku.

Ráðið hevur avgjørt at taka ymisk viðkomandi mál upp til viðgerðar, so sum eutanasi, gengransking o.a. sum er viðkomandi at viðgera út frá einum sjúkrarøktaretiskum sjónarhornið. Ráðið hevur seinast viðgjørt spurningin um broytingar í fosturtøkulóggávuni og fría fosturtøku og fer, tá viðgerðin er liðug, at leggja nakrar av niðurstøðunum út á heimasíðuna.

Í ár standa tveir limir, Katrin Andersen og Birna M. Joensen og tiltakslimur Hildur við Høgadalsá fyri vali. Roynt verður at seta eina lýsing í Vøku fyri at vita um aðrir limir eru áhugaðir at stilla upp til Sjúkrarøktaretiska ráðið.

Katrin Andersen Forkvinna.